

GUÐRIÐ HANSDÓTTIR

# Tónin blivin ljósari

Fantastiska Guðrun Hansdóttir, sum í summar hevur givið nýggja fløgu út, er til reiðar til enn ein Summar Festival. Songkvinnan við teimum frálíku sangunum hevur fleiri ferðir áður spælt á Føroya størsta festivali, og í august er hon til reiðar við einari framførslu við nýggjum sangum og gomlu hittunum.

Guðrið Hansdóttir gav í juni út aðru fløgu sína – hon kallast The Sky Is Opening. Fløgan er merkt av nakað glaðari og lættari sangum enn á fyrru útgávuni hjá Guðrið, og móttøkan av fløguni hevur verið sera góð.

Og Summar Festivalurin fegnast um, at mest aktuella songkvinnan í Føroyum fer at seta dám á ársins festival.

DYNAMITT

# Eingin kann standa ímóti

Summar Festivalurin hevur fest í fjúsið, og um vikuskiftið fer Dynamitt í luftina á Vágsbøi. Vælumtókti poppbólkurin við teimum stuttligu, fangandi og øru sangunum er til reiðar til enn eitt tørn á Summar Festivalinum.

Teir kunnu fáa eina áhoyrarafjøld at flippa út, sum galt tað lívið. Teir kunnu fáa blóðið í kók hjá teimum kritisku ummælarunum. Og teir kunnu fáa øll – næstan øll – at syngja við til stuttligar, fjollutar og festligar sangir.

Líkamikið hvat fólk halda um Dynamitt, so ber til at staðfesta, at tað er ein bólkur uttan sín líka. Lívligu og løttu poppsangirnir hava verið tráspældir í útvarpi, og á konsertum og í dansi hava fólk tikið væl ímóti hálvøra bólkinum.

Áhoyrarafjøldina hava teir altíð havt í síni hulu hond. Teir kunnu lyfta fólk upp frá, rysta og ruska tey, so at tey missa fótafestið og tíðarkensluna, og so senda tey heim við einum stóru smíli og einari góðari kenslu í kroppinum.

Dynamitt hevur ongantíð reypað sær av at verða tann tekniskt besti bólkurin, men teir hava sum fáir bólkar dugað at skriva og spælt landaplágur. Sum dansibólkur frá 1984 og nógv ár fram var Dynamitt í serflokki, og á útgávum síðani 1987 hava teir eisini setti síni týðuligu spor í føroyska tónleikalandslagnum.

Og við framførslunum fyri túsundtals fólkum á Summar Festivalinum hava teir lagt nakað heilt serligt afturat sínum avrikum. Fólk í stórum tali hava dyrkað teir, og áheitanar á Summar Festivalin um at fáa Dynamitt aftur á skránna hava verið óteljandi.

Og tað ber ikki til at standa ímóti, so Dynamitt spælir aftur á Summar Festivalinum 2009.





HANUS G. JOHANSEN

# Tí halda vit Summar Festival

- Hví halda vit Summar Festival?

- Tí Hanus G. Johansen var føddur!

Soleiðis spurdi og svaraði frásøgumaðurin Sjúrður Skaale á Stóra Palli á Summar Festivalinum eitt árið. Jú, Hanus G. Johansen hevur verið við á øllum Summar Festivalunum higartil, og hann verður aftur at hoyra í 2009 - sætta árið á rað.

Veruleikin er heilt einfalt tann, at Hanus G. Johansen hoyrir við til ein góðan Summar Festival. Hansara framførslur á undanfarnu festivalum hava verið framúr góðar, og vit gleða okkum til at hoyra eyðkenda vísusangaran spæla á Summar Festivalinum í ár.

Útboðið av sangum hjá honum er stórt og væl kent, og fólk eru altíð klár at syngja við til hansara framúr góðu tulkingar av yrkingum hjá kendum føroyskum yrkjarum.